## Nýggj góðkenning til Atlantic Petroleum

OLJUÚTBYGGING
*tíðindaskriv*

Ensku mynduleikarnir hava góðkent útbyggingarætlan fyri Chestnut feltið í enskum øki P/F Atlantic Petroleum hevur, saman við Venture Production og Bow Valley, fingið góðkenning frá Department of Trade and Industry (enska vinnumálaráðnum) til at útbyggja Chestnut feltið, ið liggur í teigi 22/2a í enskum øki. Atlantic Petroleum eigur 15% í loyvinum.

Chestnut verður útbygt við einum flótandi framleiðslupalli, SSP300, ið norska felagið Sevan Marine eigur. Hetta er eitt nýtt slag av framleiðslupalli, ið eftir ætlan fer til verka á Chestnut í 3. ársfjórðingi 2007.

Mett er at millum seks og nýggju milliónir tunnur av olju kunnu útvinnast úr feltinum, og verður fyrsta framleiðsla síðst í 2007. Av hesum er parturin hjá Atlantic Petroleum millum 900.000 og 1.350.000 tunnur. Dagliga framleiðslan verður við byrjan umleið 1.400 tunnur um dagin til Atlantic Petroleum.

Vit eru sera fegin um at hava fingið góðkenning til at útbyggja Chestnut feltið. Hetta er fyrsta útbygging ið Atlantic Petroleum luttekur í, og tí er góðkenningin eisini ein hornasteinur í søgu felagsins. Somuleiðis er góðkenningin søgulig fyri oljuframleiðslu í Norðsjónum, av tí at Chestnut er eitt tað minsta sjálvstøðuga feltið, ið higartil verður útbygt í Norðsjónum. Útbyggingin av Chestnut passar væl til vinnuætlanina hjá Atlantic Petroleum, sum er at luttaka í útbyggingum av minni feltum í Norðsjónum. Við at nýta flótandi framleiðslupallin SSP300 hava luttakandi feløgini í Chestnut valt eina útbyggingarloysn ið er nýhugsandi og minni kostnaðarmikil enn higartil nýttar loysnir, sigur Vilhelm Petersen, stjóri í Atlantic Petroleum.

# Stuttligari at eiga sethús

**Bæði Føroya Banki og Sparikassin komu í dag á marknaðin við nýggjum fíggingartilboðum. Felags fyri hesi er, at tað framyvir verður bíligari at útvega sær sethúsafígging. Hinvegin eru útlit fyri støðugt hækkandi avgreiðslugjøldum**




*Sum fyrsti føroyski peningastovnurin hevur Sparikassin nú eisini realkreditt-lán í sínum útboði*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

FÍGGING
*Jákup Mørk*

Tað hevur veruliga skapt lív í føroyska fíggjarmarknaðin, at lokalu sparikassarnir seinastu tíðina hava víðkað sín heimamarknað. Eftir at Føroya Banki og Sparikassin í nógv ár - tó eisini saman við Húsalánsgrunninum - hava verið mest sum einsamallir um sethúsafígging í miðstaðarøkinum, er kappingin brádliga harðnað munandi. Og tað kemur nú brúkaranum til góðar.

Samstundis hevur gongdin í nógv ár verið tann, at føroyingar hava verið raskir at niðurgjalda skuld. Øktir sethúsaprísir hava samstundis hækkað frívirðið á sethúsum, og tí er vágin hjá peningastovnunum minkaður heilt munandi.

Og so skal heldur ikki síggjast burtur frá, at hjá nógvum er eftirlønaruppsparingin nú komin á eitt støði, har sethúsaeigarin ikki longur hevur sama tørv á eini skuldarfríari pensionistatilveru. Við øðrum orðum, so er trendurin alt meira, at frælsið at avgera egið nýtslumynstur er økt.

### Kundin er vinnarin

Hvør orsøk hevur vigað mest, er sjálvandi ilt at taka dagar ímillum. Men tað tykist púrasta víst, at tað hjá vanligu sethúsaeigarunum nú verður lættari at eiga - og ikki minst at gjalda - egin hús.

Lægri renta, longri afturgjaldstíð og øktir møguleikar fyri gjaldsskáum hava við sær, at sethúsaeigararnir í dag hava eitt munandi størri rásarúm til aðra privatnýtslu. Tað verið seg nýggjan bil, umbygging av húsum, fleiri uttanlandsferðir. You name it.

Tilboðini, sum teir báðir stóru peningastovnarnir nú eru komnir við, eru ikki eins. Føroya Banki bjóðar nú eina lægri rentu og øktan fleksibilitet á bústaðarlánum. Sparikassin hevur hinvegin sum fyrsti føroyski peningastovnurin nú eisini realkreditt-lán í sínum útboði. Hesi hava aloftast eina nakað lægri rentu enn vanlig bankalán, meðan tey hinvegin ikki eru eins fleksibul.

- Samstundis er tað ein veruleiki, at útreiðslurnar eru tyngstar at bera hjá ungum barnafamiljum, bæði tí lønin ikki er komin í hæddina, og tí at útreiðslurnar eru stórar. Við nýggju realkredittlánunum frá Føroya Sparikassa ber til at útjavna henda skeivleika. Møguleiki er at leingja lánini úr teimum núverandi 20 árunum upp í 30 ár og/ella at hava avdráttarfrí tíðarskeið, sigur Marner Jacobsen, forstjóri í Føroya Sparikassa um nýggja tilboðið, sum tey nú veita.

### Gjøldini hækka

Allar medaljur hava tó eisini sína baksíðu. Við eini lægri rentu og betraðum treytum til privat-kundarnar, missa føroysku peningastovnarnir eina av kjarnuinntøkunum, og hetta eru ikki inntøkur, sum peningastovnarnir vilja vera fyriuttan.

- Hjá okkum er avgreiðslugjaldið fyri at leggja um til nýggju lánini 4.000 kr. Men tað duga vit ikki at síggja nakað óvanligt í, heldur Janus Petersen, stjóri í Føroya Banka.

- Tú skalt jú minnast til, at skyldar tú eina millión, so hevur tú vunnið hetta gjaldið aftur longu fyrsta árið við lækkaðu rentuni.

- Gongdin í londunum kring okkum hevur jú í fleiri ár verið, at tú rindar fyri ta tænastu, sum tú nýtir. Hjá okkum hevur siðvenjan kanska verið tann øvuta. Nevnliga at tænastan hevur verið mest sum ókeypis, meðan peningastovnarnir ístaðin hava vunnið peningin upp á rentumarginalarnar. Og tað er kanska meira órættvíst, tí tá gjalda nøkur fyri tænasturnar, sum onnur fáa.

Skulu vit so rokna við, at hesi gjøldini fara at økjast meira í framtíðini?

- Tað er nokk eingin ivi um. Vit vilja fegin vera kappingarfør - eisini við útlendskar veitarar - í rentustøði og øðrum. Men vit vilja eisini forvinna pening, og tí kemur tann parturin í alt størri mun yvir á gjøld og provisiónir. Tekur tú Danmark sum dømi, so eru slík gjøld nærum ein triðingur av inntøkunum hjá peningastovnunum, meðan vit her heima bara fáa nøkur fá prosent av okkara inntøkum tann vegin, sigur Janus Petersen, stjóri í Føroya Banka.



*Janus Petersenn, stjóri í Føroya Banka, sigur, at tey fegin lækka rentuna. Men hinvegin vil bankin eisini framhaldandi vinna pening, og tað merkir, at kundin í framtíðini skal rokna við øktum ómaks- og avgreiðslugjøldum*

## Nýggju tilboðini

**Føroya Banki**

**Nýtt sethúsalán við heitinum Skáalán**

Rentulækking úr 4,25% niður í 3,85% fyri vanlig sethúsalán. Samstundis er øktur møguleiki fyri gjaldsskáa. Fullan skáa kunnu lántakarar hava í minsta lagi ein mánað og í mesta lagi eitt ár fyri hvørji trý lánsár uttan gjaldsskáar. Umframt hetta kann lántakarin velja avdráttarskáar eftir vild og harvið bara rinda rentu men ongan avdrátt í mesta lagi trý ár.

Kostnaður av umlegging: 4.000

**Føroya Sparikassi**

Realkreditt-lán upp til 60% av metta bústaðarvirðinum. Hini 40% verða fíggja sum vanlig sethúsafígging.

Møguleikar fyri:
- Rentutillaging, sum gevur lægst møguligu rentuna við at fylgja marknaðarrentuni
- Fastrentu, har rentan verður ásett til sama sat alt lánstíðarskeiðið
- Garantilán, gevur lága rentu, samstundis sum rentuloft verður tryggjað
- Øll trý lánisløgini geva møguleika fyri avdráttarskáa í upp til 10 ár

Lægsta renta er í løtuni 3,71%. Við Fastlán er rentan 5,70%.

Kostnaður av umlegging: 1,75% av lánsupphæddini í stovningarprovisión.